

# Apollo var turrur

Jan Müller

20.06.2014 - 10:42

Oljan.fo

Tað loysti seg neyvan hjá Statoil at fremja ta umstríddu boringina á Apollo-leiðini. Í dag kunnger oljumálaráðið í Oslo, at brunnurin var turrur.

Tað var pallurin Transocean Spitsbergen (myndin), sum boraði.

Apollo er tann norðasta boringin, sum er gjøgnumførd á norskum øki, og verkætlanin elvdi til stóra mótstøðu frá eitt nú umhvørvisverndarfelagsskapinum Greenpeace.

Apollo er einar 45 kilometrar norðan fyri Wisting-fundið og einar 350 kilometrar norður úr Hammerfest.

Men tað vánaliga úrslitið á Apollo fær ikki Statoil at sleppa endanum. Felagið hevur gjørt av at bora tveir brunnar afturat í grannalagnum, Tað eru Atlantis og Mercury, og Transocean Spitsbergen skal eisini bora teir.